# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Exit Bush

Bush var í útgangsstøði ein forseti, sum rak ein virðisgrundaðan politikk – heimsmyndin var svørthvít. Virðini vóru ein blanding av neokonservatismu, neoliberalismu og ein herferð móti tí "ónda". Tað "ónda" fevndi um yvirgang og alt, sum ikki hóskaði til einføldu og svørt-hvítu heimsmynd forsetans og ráðgevarum hans. Ikki var rúmsátt í politisku heimspeki hansara og tí gjørdust tey átta árini við Bush so kompromisleys og so harðrend. Lat so vera, at skelkurin frá 11. september broytti heimsmyndina hjá nógvum amerikanum. Við hesum bakstøði fór Bush í tvey stór kríggj: kríggið í Afghanistan, høvuðssætið hjá Al Qaida og Irak við hópoyðingarvápnunm. Afghanistankríggið hevur ikki beint fyri altjóða yvirgangi og Irak hevði eingi hópoyðingarvápn. Hesi kríggj hava drenað USA fyri politiska og búskaparliga orku.

Bush tók yvir eitt USA, sum var stak væl fyri á øllum økjum. USA hevði onga uttanlandaskuld, samveldislandskassin var skuldafríur og avlop var á samveldisfíggjarlógunum. Arbeiðsloysið var metlágt, vinnulívið blómaði og hjá einstøku statunum í samveldinum stóð væl til. Alt samfelagið var í góðari og sunnari menning og utttanríkispolitiskt var USA komið væl burtur úr stórum kreppum, eitt nú á Balkan, uttan at amerikanskir hermenn vóru í kríggj á fremmandari jørð.

Hvussu sær USA út í dag, nú Bush leggur frá sær? Á fráfaringartíðindafundi fyri fáum døgum síðani varð Bush spurdur, hvussu tað kendist at leggja frá sær, sum støðan var í USA og í heiminum. Hann svaraði á sín sermerkta hátt: eg eri nokk ikki ein, sum ríði móti sólsetri. Hann sipaði til teir covboyfilmar, sum enda væl. Hansara filmur endaði illa: 11, les ellivu, milliónir eru vorðin arbeiðsleys, eitt út av hvørjum tíggju húskjum hava mist hús og heim, húsagangur og trotabúgv eyðkenna vinnulívið, bankakreppan stendur við, verkafólk í milliónatali hava mist teirra pensiónsuppsparingar, almenna huglagið er eyðkent av mismóti og ótta fyri framtíðini. Alt gekk galið og eygleiðarar halda, at tað mátti ganga galið. Heimurin er jú ikki svart-hvítur. Tað ber ikki til at stýra einum stórveldi við støði í neokonservativum virðum heldur enn við støði í tí politiska og búskaparliga veruleika, sum nú einaferð myndar eins egna samfelag so væl sum umheimin. Úrslit: USA er politiskt, búskaparliga og moralskt á ørmundahúsi. Upptakið, sum stendur til eftirfylgjaran, er ikki tespiligt.

Var so als einki gott – einki sum eydnaðist? Jú, halda ávísir eygleiðarar. Bush setti Afrika á politisku dagskrá heimsins og menningarhjálpin frá USA hevur veruliga munað. Hetta hevur serstakliga gagnað stríðnum móti eyðkvæmi í pørtum av hesum gloymda heimsparti. Eisini fær Bush rós fyri Indiapolitikkin, sum hevur gagnað og hjálpt ovurstóra menningarlandinum til at gerast millum fremstu búskapir í heiminum. Men eftir stendur tó heildarmyndin av einum forseta, sum ikki fær mildan dóm frá søguni.

**Sosialurin**

# Formaðurin fremur rættarbrot í fiskimannafelagnum

ÓLI JACOBSEN



Tað er ikki so løgið, um eg royni at fylgja við í tí, sum hendir í fiskimannafelagnum eftir at hava brúkt 36 ár at menna tað. Men tað er ikki lætt at fylgja við. Frá at hava havt bestu kunningartænastu yvirhøvur hjá nøkrum fakfelagi, hevur felagið nú ta framúr vánaligastu.

Tó ber til við tí, sum kortini kemur alment fram at gera sær eina mynd av, hvussu gongdin er hjá felagnum. Hon er lítið hugalig!

**Skaðar fiskimannnaáhugamálum gjøgnum Samtak**

Tað er greitt, at fiskimannafelagið er á fallandi fót.

Tað grundleggjandi er, at síðan formansskiftið eru týðandi formansfunktiónir lagdar til fólk uttanfyri fiskimannafelagið.

Tað eru fleiri og fleri av kjarnuøkjunum hjá FF, sum verða flutt yvir til Samtak, har FF ikki á nakran hátt er ein javnbjóðis partur. Tað sama er við uppløgdum formansfunktiónum, sum felagið sjálvt hevur havt førleika at røkja í nærum 100 ár, og sum nú verður goldið øðrum at røkja.

Tað eru fleiri dømi um, at FF gjøgnum Samtak er farið beinleiðis ímóti áhugamálunum hjá fiskimonnum og felagnum. Her kann nevnast almennur fiskivinnupolitikkur, har FF gjøgnum Samtak til dømis hevur sett seg ímóti, at fiskimenn kunnu virka fiskin umborð.

Um hetta var eitt úrslit av eini breiðari viðgerð í felagnum, var hetta so sínar sakir.

Men nú kann staðfestast mannagongdin sum verður nýtt.

**Forðar nevndarlimum at viðgera stórmál**

Avgerandi dømið um arbeiðsgongdina hjá Jan Højgaard er flytingin av samlagstrygginina hjá FF til danska felagið Alka, har hini feløgini í Samtak hava sínar tryggingar.

Í ársfrágreiðingini hjá Jan Højgaard fyri 2008 verður sagt, at felagið hevur tingast við trý feløg um samlagstrygging, men "nú hevur nevndin avgjørt at tekna trygging hjá ALKA."

Tað er sjálvsagt eitt framstig at bøtt verður um tryggingarviðurskiftini, men júst hetta skifti saman við uppsøgn av tí samstarvi, sum hevur verið við hini manningarfeløgini, er sera prinsipielt á fleiri økjum.

Tað, sum er komið fram um hetta mál, bæði alment og á seinasta landsfundi, er fylgjandi:

Uppskotið um hesa flyting av tryggingini er komið frá Jan Højgaard, og hetta hevur hann sjálvsagt rætt til. Tað kann hava týdning fyri at skilja seinni gongdina, at hetta var nevnt við introduktiónina av Samtak í 2007.

Tað var partur í nevndini, sum vildi hava málið lýst til lítar kanna allar møguleikar, so nevndin kundi vera før fyri at taka ta avgerð, sum gagnaði fiskimonnum best.

Tískil varð eisini tingast við føroysku tryggingarfeløgini at vita, hvat tey kundu bjóða.

Í einum slíkum prinsippiellum máli er tað ein sjálvfylgja, at ein samlað nevnd er við í viðgerðini og støðutakanini, um hetta yvirhøvur er møguligt.

**Legði avgerandi fund, táið hann visti, at nevndarlimir ikki kundu møta**

Í eini nevnd, har fleiri menn eru siglandi, er ikki møguligt hjá øllum altíð at møta á nevndarfundi. Men tá hevur altíð verið ansað eftir at leggja fundirnar, táið allir nevndarlimir vóru heima, serliga tá avgerandi mál eru á skránni. Hetta letur seg vanliga væl gera. Tað var eisini ríkiligt av tíð at gera tað í hesum máli, nevniliga fleiri mánaðir.

Men soleiðis er ikki hjá Jan Højgaard. Í hesum málinum syrgdi hann snildisliga fyri at leggja avgerandi fundin, tá ið hann visti, at tann partur av nevndini, sum kundi vera ivasamur til hansara uppskot, ikki hevði møguleika at møta.

Tað var ikki bara tað. Hann syrgdi enntá fyri, at avgerðin varð tikin, áðrenn endaliga tilboðið hjá føroysku tryggingunum vóru felagnum í hendi!

Tað er á hesum grundarlagi, at henda samtyktin er gjørd, har Jan Højgaard tilvitað hevur hildið part av nevndini uttanfyri bæði endaligu viðgerðini og sjálvari avgerðini.

Millum teir, sum eru hildnir uttanfyri, er næstformaðurin í felagnum, soleiðis sum tað kom fram á landsfundinum. Hann hevði verið í tí bólki, sum fór niður til Danmarkar at tingast við Alka, og sum tí hevði ein serligan førleika at vera við í viðgerðini.

**Groft brot á grundleggjandi rættindi**

Sigast kann, at henda mannagongd er tilætlað eitt groft brot á grundreglunum í einum fólkaræði, eisini í einum fakfelag. Her er talan um brot bæði á óskrivaðar og skrivaðar reglur.

Hetta er so enn eitt dømi um, at tær veruliga avgerðirnar í Fiskimannafelagnum verða tiknar uttanfyri felagið, uttan at hægsti myndugleikin í felagnum millum landsfundirnar, nevniliga felagsstjórnin, fær reellan møguleika at vera við í avgerðini. Tá ið hetta passar formanninum!

Til hetta er stutt at siga, at slík brot á grundleggjandi fólkaræðislig prinsippir kann bert merkja undirgongd fyri eitt hvørt samfelag. Hetta er eisini galdandi fyri eitt fakfelag. Í hesum førinum gongur sjón fyri søgn.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.